# ítróttur

Nr. 10 • fríggjadagur • 16. januar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# Ein til hvønn enda hjá B36

**Ein vandamikil álopsmaður og nýggjur málverji tykjast standa ovastir á listanum hjá B36, men hetta verður avvíst av leiðsluni í felagnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eitt av feløgunum, har gjøgnumtrekkurin í vetrarsteðginum hevur verið hampuliga stórur, er árstalsfelagið úr B36. Hóast felagði í fjør vann steypakappingina og fekk silvur í landskappingini, og soleiðis stóð við bestu samlaðu úrtøkuni í heiðursmerkjum, so mundu tað tó vera fleiri, sum ikki vóru heilt nøgd við hetta. Og einki er at taka seg aftur í, at høvuðsorsøkin til ónøgdina man vera, at tað vórðu júst grannarnir úr HB, sum struku avstað við FM-heitinum. Enntá eftir at hava sigrað í eini regulerari FM-finalu í Gundadali.

## Nøgdir við hópin

Mett varð annars frá fleiri síðum, at hópurin hjá felagnum í fjør var tann sterkasti í landinum, og fram til november mánað bendi tað mesta eisini á, at hetta eisini skuldi verða støðan í 2004. Ikki minst eftir at tað tóktist greitt, at verjan á liðnum skuldi fáa tilgongd av Arnbjørn Danielsen og Jóhannis Joensen.

Men seinastu tveir mánaðirnir á árinum vóru sera døkkir fyri B36-viðhaldsfólkini. Sjokk-boðini um skiftið hjá Jákupi á Borg til HB vórðu tollaksmessudag fylgd upp av einum tilsvarandi skifti hjá Heðini á Lakjuni, og fyri tey allarflestu í felagnum mundi hetta kennast sum tvey risa bakkøst. Eisini hóast leiðslan í felagnum í seinna førinum segði, at missurin hóast alt ikki var so øgiligur.

Her varð hinvegin víst á tilgongdinia, sum liðið hevur tryggjað sær. Umframt teir báðar omanfyri nevndu verjuleikarar, er talan um Jens Erik Rasmussen, Ronnie Samuelsen og Egil í Bø, sum allir hava gjørt sáttmála við B36 fyri komandi kappingarárið.



*Tað hevur ljóðaða, at vátt er komið í reiðrið millum B36 og Trónd Vatnhamar, og tað kundi bent á, at nakað er um tosið um nýggja málverjan*

Hetta eru alt leikarar, sum ivaleyst høvdu pyntað um flestu fyrstudeildarhópir kring landið, men tað tykist ikki, sum um innkeypsferðin hjá múgvandi árstalsfelagnum er av fyri tað. Síðani skiftið hjá Jákupi á Borg hevur verið tutlað um, at felagið hevur leitað eftir nýggjum áleypara, og fleiri ferðir hevur slaturin ljóðað um, at talan skal vera um leikara úr bestu íslendsku deildini. Enn tykist tó einki vera greitt í so máta, og leiðslan í felagnum er eisini tøtt sum tunnan í so máta.

– Vit halda okkum í øllum førum hava gjørt okkum væl út til komandi kappingarár, sigur formaðurin í B36, Kristian á Neystabø.

– Vit hava tann hópin, sum er í løtuni, og hann eru vit nøgdir við. Eg kann sjálvandi ikki útiloka, at talan verður um onkran styrk afturat, men fyri fyrst halda vit okkum til hópin, sum vit hava, er einasta viðmerkingin frá formanninum, sum ikki sigur kenna nakað til, at teir í løtuni eru í samráðingum við aðrar leikarar.

## Ein til hvønn enda

Sosialurin er tó vitandi um, at B36 í longri tíð hevur havt samband í Íslandi, har tað serliga hava verið tveir leikarar, sum hava verið upp á tal. Annar er danin, Allan Borgvard, sum áður hevur leikt við AGF, og sum í fjør varð kosin ársins leikari eftir eitt sera gott kappingarár í FH. Hin er ein brasilskur áleypari, sum í síni tíð var liðfelagi við Jens Erik Rasmussen í Leiftri. Hesin varð eisini fyri tveimum árum síðani í sambandi við FS Vágar, men ta ferðina varð handilin so av ongum.

Og úr Danmark frættist eisini, at B36 her hevur verið í sambandi við ein málverja. Talan er um 22 ára gamla Henrik Bødker, sum í løtuni spælir við Lyngby. Undan hesum hevur hann roynt seg í bæði AGF og FC Aarhus, og á CV'inum standa higartil tríggir dystir í donsku superliguni, umframt at hann upp ígjøgnum árini hevur verið fastur fúsur á ymsum ungdómslandsliðum. Hann varð í mong ár roknaður sum eitt tað størsta danska málverjatalentið í longri tíð, men síðani tykist menningin tó vera steðga nakað.

Tað hevur ljóðað í eina tíð, at tað er komið vátt í reiðrið millum B36 og Trónd Vatnhamar, sum hevur verið málverji seinnu árini, og tað kundi væl verið, at tað er fremsta orsøkin til, at B36 nú leitar sær eftir nýggjum manni at seta á plássið.

Sum nevnt, so verða tó eingi av hesum tíðindum váttað av leiðsluni í felagnum, men felagið hevur aðalfund um góða viku, og tá plagar tað ofta at vera so, at nevndin boðar frá um onkran nýggjan leikara, sum er fingin til vega. Um tað so eisini verður støðan hesaferð, fæst helst at vita um góða viku.




NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK JANUAR 2004**

**SKRÁIN VIKA 3 og 4**

**Fríggjadagur 16. januar**
**Kl. 20.00 Føroyskur barnadansur** Dansifelagið í Havn (FO) og Norðurlandahúsið í Føroyum

**Leygardagur 17. januar**
**Kl. 14.00 Listaframsýning:** 8 listafólk úr Suðurjútlandi/Suðurslesvig (DK) Fyriskipari: Nordisk Informationskontor i Sønderjylland

**Sunnudagur 18. januar**
**Kl. 19.00 Løgtingsvalið 2004** Fyriskiparar: Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya. Valsendingin verður send beinleiðis í ÚF og SvF

**Mikudagur 21. januar**
**Kl. 13.00 Húsið letur upp** - er stongt fyrrapart

**Kl. 20.00 KLIPP** Filmsfelag Norðurlandahúsins sýnir virðislønta filmin "Nói, Albinói" leikstjóri Dagur Kári (ÍS) 90 min

Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-17.00 og sunnudagar kl. 14.00-17.00

NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790
www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo




# Rokna við 3000 áskoðarum

**Tá ið føroyska hondbóltslandsliðið seinnapartin í dag skal leika tann fyrra av teimum báðum landsdystunum á útivølli ímóti Rumenia hetta vikuskifti, verður tað undir heilt øðrum umstøðum, enn hvat okkara menn eru vanir við.**

LANDSDYSTUR
*Terji Nielsen*

Tað varð ein drúgv ferð hjá føroyska liðnum til Rumenia. Føroyski hópurin fór úr Vágum týsmorgunin kl. 11 við Atlantsflog, og ikki fyrr enn eftir nátturðatíð mikukvøldið var liðið komið á gistingarhúsið í Rumenia. Tað var ikki sørt, at menn vóru moyrir, tá ið Sosialurin fekk fatur á landsliðsvenjaranum, Lars Nedergaard, stutt eftir at teir vóru komnir á gistingarhúsið.

## Góðar umstøður

Tá ið føroysk ítróttarlið hava vitjað í onkrum av teimum fyrrverandi kommunistisku londunum, hava umstøðurnar ikki altíð verið av teimum bestu. Lars Nedergaard sigur, at teir vóru ikki sørt spentir upp á umstøðurnar í Rumenia, men framkomnir kunnu teir bert staðfesta, at umstøðurnar eru á eini heilt góðari leið. Gistingarhúsið er gott, og maturin er somuleiðis góður.



*Eli Müller er ivasamur til dystirnar móti Rumenia, men í aðrar mátar tykist hópurin til reiðar til avbjóðingarnar*

Mikukvøldið skuldi hópurin hava ein stuttan fund eftir nátturða, og síðani var farið eftir høvdinum í song. Hósdagin var ein venjing á skránni, og í morgun skuldi liðið so hava eina stutta og lætta venjing. Fyrsti dysturin á ferðini verður leiktur seinnapartin í dag kl. 17.00 rumenska tíð, sum er tveir tímar framman fyri okkum. Til dystin í dag rokna rumenar við okkurt um 1500 áskoðarum, meðan til seinna dystin, sum verður leiktur sunnumorgunin kl. 11.00 rumenska tíð, verður roknað við fullum húsi, tað vil siga 3000 áskoðarum.

Lars Nedergaard sigur, at føroyska liðið skal rokna við heilt øðrum karmum til dystirnar, enn hvat teir eru vanir. Eystureuropeiskir hondbóltsáskoðarar halda ein øgiligan gang undir dystinum, og vit kunnu rokna við rómaraljósum og kanónsløgum, sigur Lars Nedergaard, landsliðsvenjari. Hann leggur aftrat, at tað verður umráðandi hjá okkara leikarum at megna at halda konsentratiónina um dystin og ikki larmandi áskoðarafjøldina.

## Eli er einasti ivasami leikarin

Sambært Lars Nedergaard er føroyski hópurin væl fyri. Hýrurin er góður, men tríggir leikarar fáa viðgerð upp undir dystirnar um vikuskiftið. Tað eru teir tríggir Ingi Olsen, Halgir Dahl-Olesen og Eli Müller. Lars Nedergaard sigur, at hann væntar fyri vist, at Ingi og Halgir verða klárir til dystin, meðan tað er meira ivasamt við okkara málverja Eli Müller. Eli hevur ein skaða í lærinum, sum av fyrstan tíð ikki var mettur at verða so álvarsamur, men nú vísir tað seg, at vit møguliga noyðast at verða uttan Eli í málinum ímóti rumenum. Um so verður, er tað einki at ivast í, at tað er ein dyggur smeitur fyri føroyingar.

## Rumenar vænta at vinna við 15-20 málum

Spurdur um hvørja mótstøðu vit kunnu rokna við um vikuskiftið, sigur føroyski landsliðsvenjarin, at vit hitta eitt sera sterkt lið, ið er mannað við nógvum stórum og skotsterkum leikarum. Lars Nedergaard sigur, at fyri bert tveimum árum síðani vunnu rumenar ein greiðan sigur á normonnum í Rumenia, og styrkina hjá norska landsliðnum kenna vit jú alt til.

Rumenar rokna eisini við, at tað verður ein løtt uppgáva at basa føroysku amatørunum, og Lars Nedergaard sigur, at hann hevur hoyrt, at rumenar rokna við at vinna við einum 15 til 20 málum ímóti okkara monnum.

Føroyski landsliðsvenjarin nevnir í sama viðfangi, at til dystirnar um vikuskiftið verður tað eitt dómarapar úr Italiu, ið skal stýra dystunum, og tað metir Lars Nedergaard ikki er til okkara fyrimun. Tað verður mangan sagt, at suðureuropeiskir dómarar ofta lata seg ávirka av áskoðarafjøldini, men lat okkum vóna, at so verður ikki í hesum føri.


